## Hummari sum fiskur

Loyvi at fiska hummara skulu viðgerast eftir somu reglum sum vanlig fiskiloyvi, sigur Løgtingsins Umboðsmaður, sum hevur viðgjørt eina kæru frá manni, ið fekk noktandi svar frá fiskimálaráðnum, tá hann ætlaði sær at flyta eitt hummaraloyvi frá einum báti til ein annan í sama bólki. Umboðsmaðurin sigur, at tað var skeivt at sýta umsóknini og hevur tí átalað fiskimálaráðið, sum eisini fær átalu, tí tað brúkti ov langa tíð at viðgera málið.

## Lýggjur apríl

Tað var rættiliga lýtt í Íslandi í síðsta mánað, og í tveimum umførum var tað so lýtt, at veðurmenninir tosa um tvær hitabylgjur. Hinvegin var eisini rættiliga avfall í apríl. Í Reykjavík var meðalhitin 5,2 stig, og tað er 2,3 stig oman fyri meðalhitan í apríl tey seinastu 137 árini. Á Akureyri var meðalhitin 4,9 stig, og tað er heili 3,3 stig oman fyri meðalhitan hini árini. Mesti hiti í Íslandi í apríl var 23 stig, og tað er tað mesta síðani 2003.

# Næstu tunlarnir verða í Norðoyggjum

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum heldur, at tunlarnir í Norðoyggjum eru teir næstu, sum eiga at verða gjørdir**

TUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm heldur, at tá ið Hovstunnilin er liðugur, skulu tunlarnir í Norðoyggjum verða teir næstu á skránni*

Stendur tað til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, verður tað tveir tunlar í Norðoyggjum, sum eiga at verða raðfestir fremst av øllum tunlunum, sum annars eru á skránni.

Tað boðaði hann frá nú í vikuni.

Tað var Karsten Hansen, løgtingsmaður, sum vildi hava at vita, hvussu gongur við fyrireikingunum til tunnilin ímillum Klaksvík, Árnafjørð og Norðdepil og við tunlinum úr Hvannasundi til Viðareiði.

Bjarni Djurholm sigur, at í næstu tingsetu er ætlanin at leggja uppskot fyri Løgtingið um tunnil úr Klaksvík, norður um fjall.

Hvat viðvíkur tunli til Viðareiðis, eru kanningar eftir at gera, so tað fær hann ikki sagt so nógv um enn.

Bjarni Djuholm sigur, at hann kundi hugsa sær, at raðfestingin verður so, at fyrst verður tunnilin norður um fjall gjørdur og tá ið hann er liðugur, verður farið undir tunnil til Viðareiðis beinanvegin, tí talan er um dýrar tunlar, tí teir kosta fast í 200 milliónir hvør, so tað verður torført at gera báðar ísenn.

- Men teir eiga at verða gjørdir í hølinum á hvørjum øðrum, sigur hann.

Sostatt heldur Bjarni Djurholm, at táið Hovstunnilin er liðugur, eiga tunlarnir á Norðoyggjum at verða næstir á skránni.

### Nógvir tunlar á skránni

Kortini legði Bjarni Djurholm afturat, at nógvir tunlar eru á skránni og at tað áliggur Løgtinginum at raðfesta, í hvørjari raðfylgju, teir skulu gerast. Og enn er ongin politisk viðgerð verið av spurninginum um, í hvørjari raðfylgju, tunlarnir skulu gerast.

Hann legði kortini afturat, at vinnumálaráðið hevur arbeitt miðvíst fyri at slóða fyri, at arbeiðið upp á tunlarnar í Norðoyggjum kann fara ígongd, so at haldast kann fram har, tá ið Hovstunnilin er liðugur.

Hann heldur tað vera hóskandi, at vit brúka 150-160 milliónir um árið til vegagerð og so ræður um at gera eina raðfesting.

Hann vísti eisini á, at smærri tunlar, til Dals, Fámjins og til Tjørnuvíkar, eiga onkusvegna at passa inn ímillum.

Men tað eru eisini longri tunlar at gera, eitt nú umrøddu tunlar í Norðoyggjum, tunnil til Hvalbiar, sum er ein fløskuhálsur og tunnil Millum fjarða.

Spurningurin er so at raðfesta, men stendur tað til mín, fara vit fyrst í Norðoyggjar, endurtekur landsstýrismaðurin.

# Fingu undirskriftirnar á pappírið



*Frithleif Olsen á FJM, høgrumegin og Hanus Hansen skrivaðu undir nýggjan sáttmála fríggjadagin*

**- Tað hevur stóran týdning fyri okkum at fáa ein sáttmála, sum hendan, vit fingu á Fish Fair fríggjadagin, sigur Frithleif Olsen á FJM í Runavík**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Fyri okkum hevur tað stóran týdning, at fáa ein sáttmála sum hendan.

Frithleif Olsen, leiðari á FJM í Runavík, kann ikki vera annað enn væl nøgdur við Fish Fair stevnuna.

FJM er ein av teimum fyritøkunum, sum tað hevur eydnast at fáa ítøkiligan sáttmála undir land á stevnuni.

Tað hendi nú fríggjadagin, tá ið Frithleif Olsen og Hanus Hansen í Klaksvík, settu nøvnini undir ein sáttmála um eina nýggja verksmiðju til trolaran, Fuglberg.

Fuglberg er rækjutrolari, men tað er ikki nýggj verksmiðja til rækjur, sum nú skal setast í skipið.

Fuglberg skal nevniliga leggja um til toskafiskiskap, so rækjuverksmiðjan skal takast úr og verksmiðja til tosk, skal setast í ístaðin.

Tað skilst at hann skal undir Grønland at fiska tosk, har teir hava kvotu.

Arbeiðið byrjar beinanvegin og tað skal verða liðugt um fýra vikur.

Hóast sáttmálin varð undirskrivaður í dag, hava partarnir sjálvandi samráðst um hann í eina tíð.

Men Frithleif Olsen sigur, at hetta er ein hampuliga stórur sáttmáli, sum teir eru sera fegnir um at fáa, tí tað hevur sera stóran týdning fyri fólkið at hava arbeiðið gangandi alla tíðina.

Einir 45 mans arbeiða hjá FJM og teir hava havt nógv at gera.

Teir hava akkurát leverað verksmiðju til skotskan trolara og teir gera eisini verksmiðju til teir báðar trolararnar, sum Beta smíðar í Spania.

Annars er Frithleif Olsen vælnøgdur við Fish Fair higartil.

- Hetta er eitt fínt høvi at hitta viðskiftafólk og vit so harafturat fáa ein hampiliga stóran sáttmála, er ein eykavinningur, sum ikki kunnu annað enn fegnast um.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við